# SERSTØK BYGGISAMTYKT Á RÆTT, KOLLAFJØRÐUR

SB_Kollafjørður_ÁRÆTT_2026_2026

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta fylgiskjali 1, og fevnir um matr. nr. 171a. 175a, 175s, 175r, 175q, 175p, 175o, 175n, 175m, 175l, 175k, 175i, 175h, 175g, 175f, 175t, Kollafjørður og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir ella samanlagdir nevndu ogn.

## § 2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa íbúðar- og/ella raðhúsabygging í økinum.

Stk. 2. Økið liggur í umráðisparti A1 og D1 sum sambært almennu byggisamtyktini er ætlaður til ávikavist bústaðarbygging og frílendi.

Stk. 3. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3 NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið skal nýtast til íbúðar- og/ella raðhúsabygging, umframt fríøki og felags hentleikar til íbúgvar, sí vegleiðandi skipan av økinum í fylgiskjali 2.

## §4. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 1. Byggjast má einans innan byggiøkið sambært fylgiskjali 2.

Stk. 2 Byggstigið skal ikki fara upp um 0,30.

Stk. 3. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,70.

Stk. 4. Felagshøli til íbúgvar í økinum skal gerast, og skal hetta vera minst 4 m2 fyri hvørja íbúð.

## §5. VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir og parkering skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og sambært fylgiskjali 2.

## §6. ÚTSJÓND

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggimyndugleikan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §7. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.




## Tórshavnar Kommuna
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt Á Rætt | | | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 1 | | | | |
| **Mát** | 1:1500 | | | | |
| **Dagur** | 30.04.2026 | **Journal** | 26/03880 | **Tekna** | RSB |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna**<br>**Býarskipanardeildin** | | | | | |
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt á Rætt | | | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 2 | | | | |
| **Mát** | | | | | |
| **Dagur** | 18.05.2026 | **Journal** | 26/03880 | **Teknað** | BJH |